# TÍÐINDI

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Astrid Lindgren í Vestmanna



*Skúlin í Vestmann hevur Astrid Lindgren sum tema hesa vikuna*

*Savnsmynd*

**Barnaflokkarnir í Vestmanna Skúla hava evnisviku í hesum døgum, har Astrid Lindgren er miðdepilin. Hetta er í sambandi við, at Lindgren hevði fylt 100 ár í morgin**

TILTAK
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Næmingarnir hava arbeitt við ymiskum sum: At baka pippibollar við spunkdrússi, emilkøkur, nangijala-skuffukøgu við nangilima sjokolátu org Lindgrenlagkøku. Ymiskur lestur hevur verið á skránni við øllum teimum kendu: Pippi, Emil, Dikka, Lotta, Børnini í Dundurdali, Brøðurnir Leyvuhjarta, Ronja Ránsmannsdóttir og Mio mín Mio.

Eisini hava næmingarnir telgt Emil-figurar, gjørt dukkur og dukkufilmar, meðan onnur hava roynt seg við Lesiteaturi. Sjónleikur verður eisini við øllum teimum kendastu Lindgren-figurunum.

Sjálvur føðingardagurin í morgin verður hildin á hendan hátt: Øll møta at gera klárt klokkan átta. Síðani verður skrúðgonga klokkan 10.00, har byrjað verður undir skúlanum í Frammibø at stilla upp og síðani ganga oman á Heygar, Heygagøtu, eftir Bakkavegi, niðan Sjóvarbø, Skálatungu og inn gjøgnum Toftar og aftur í skúlan, har næmingar og lærarar fara í 100 ára føðingardag í Miðhøllini.

Føðingardagurin verður ein sonn køkuveitslu. Serliga er tað fleiri metur langa Lindgren-lagkøkan. Næmingarnir í Vestmanna Skúla bjóða til almenna Astrid Lindgren-framsýningmikudagin 14. november frá klokkan 17, har teir sýna fram úrslit frá evnisvikuni. Í annaðkvøld klokkan 20 spæla 5. og 6. flokkur sjónleikin »Ótrúliga Astrid« í auluni.



Aðalfundur hjá Føroya ProVita

Í Emmaus í Klaksvík
leygardagin 24. nov. 2007, kl 10.00.

Á aðalfundinum leggur Anne-Lene Olofsson fyri við fyrilestri undir heitinum "Ambassasør for livet".

Síðan heldur aðalfundurin fram eftir skrá sambært viðtøkum felagsins.

Uppskot til nevndarvalevnir skulu vera Pro Vita í hendi innan 20 november.

*Øll eru hjartaliga vælkomin.*

føroya PROVITA
provita@provita.fo · www.provita.fo

KREA

# Á Eiði taka tey Kyoto í álvara



*Á Eiði taka tey veðurlagsbroytingarnar í álvara-og spara pening í longdini*

Í eini tíð, har nógv hevur verið tosað um umhvørvi, veðurlagsbroytingar og Kyoto, hava tey á Eiði víst, at tey vilja gera nakað við málið. Í hesum sambandi hevur bygdaráðið á Eiði einmælt samtykt at nýggi barnagarðurin sum verður liðugur í vár, skal hava hitapumpuskipan, sigur Bygdaráðið á Eiði á heimasíðu síni. Hóast talan er um eina meir íløgu uppá uml. 160.000 krónur, verður roknað við, at íløgan er spard aftur eftir nøkrum árum, tí oljan er so dýr. Umframt at talan er um eina sparing í longdini, vil Eiðis kommunu við hesum vísa, at hon tekur umhvørvisspurningin í álvara og vil gera sítt til, at minka $CO_2$ útlátið, soleiðis, sum Kyoto sáttmálin eisini ásetur.